# Skúlin fyri øll – tó ikki fyri lærarar

TÓRA VIÐ KELDU
hjarta@kallnet.fo



**Lærarar skulu aftur fáa sítt pláss sum undirvísarar og fáa amboð og greiðar reglar at loysa størstu gerandistrupulleikarnar, sum eru líkasæla og leti. Arbeiðssemi og dugnaskapur skulu aftur á dagsskránna. Málið er ikki at duga best, men at gera sítt besta**

Tíðindini eru ikki nýggj, tó bara enn einaferð staðfest. Føroyski fólkaskúlin er fullur av strongdum lærarum. Niðurstøðan er greið. Í einum skúla, sum skal vera fyri øll og sum skal rúma øllum, missa lærararnir fótafesti og kenna ikki sítt pláss.

**Strongdin stórur trupulleiki**
Á somu tíð sum vit siga okkum arbeiða málrættað og vitvíst fyri at fáa fólkaskúlan á hægri støði, stríðast vit við trupulleikar sum líkasælar næmingar og foreldur, sum ikki nøktandi røkja skyldur mógvegis skúlanum, næmingar sum órógva, eru ófyrireikaðir, svangir, linir og - eg kundi blivið við. Skúlin hevur stutt sagt ein stóran trupulleika, tað er vantandi virðing, sum sæst aftur í teimum, sum skulu vísa vitan og menning í verki – eitt nú í ársroyndum og PISA royndum. Hetta eru tey, sum skulu læra at hava virðing fyri og kenna týdningin av vitan og persónligari menning.

**Mangla siðvenju**
Føroyar hava samanborið við onnur lond eina unga skúlasiðvenju. Hugsast kann, at vit ikki rættiliga hava gjørt okkum greitt - bæði sum land, men eisini sum avvarðandi - hvat tað vil siga at bjóða londum við gamlari og málrættaðari skúlasiðvenju sum Finnlandi, Kanada og Japan av í altjóða royndarstiga.

Um vit hyggja at skúlanum í dag, eru fakligu uppgávurnar avgjørt í vanda at missa sín týdningarmikla part av øllum uppgávum lærarans. Tað, sum lærarin í veruleikanum er útbúgvin til, at undirvísa og fáa næmingarnir at mennast í einum sunnum umhvørvi, endar sum ein peruvellingur av alskynd uppgávum, sum eru lærararanum meira ella minni óviðkomandi. Hetta eru uppgávur, sum fyrr vóru náttúrligur partur og uppgávur aðrastaðni í samfelagnum.

Uttan siðvenju er torført at vita, hvussu og hvat skal gerast. Tað vil so víðari siga, at vit mugu gera arbeiðið frá grundini. Okkum manglar avgjørt mannagongdir, sum eiga at vera náttúrligur partur av okkara hugsanarhátti. Tað er tvingandi neyðugt, at tørvandi hugburðsbroytingin vísir seg í virðing fyri grundleggjandi uppgávu skúlans, sum er at útbúgva og menna næmingar.

**Mangla virðing**
Eg eri ikki serliga gomul, men í mínari tíð kallaðu vit eitt fyri fólkaskikk. Hetta var ein almenn góðtikin meginregla fyri, hvat var góðtikið og ikki. Tað vísir seg, at í dag er alt hetta mest sum bara flutt yvir á skúlan at taka sær av. Onnur spæla fríspæl. Trupulleikin sæst í dag best í minkaðu virðingini fyri lærararanum, sum fyrr var sjálvsøgd.

Veruleikin er ræðandi, men eisini á ein hátt einfaldur. Tá so nógvar uppgávur skulu liggja í skúlanum, stjelur tað í veruleikanum undirvísingartíðina, sum næmingarnir eiga, og ikki minst kann vantandi virðingin drepa eldhugan hjá lærararanum.

Eg havi eina kenslu av, at fólkaskikkurin er á veg út gjøgnum einar sera víðar dyr, har líkasæli duravørðurin ikki finnur seg í at nakar biður hann lata dyrnar aftur. Eingin skal siga honum, hvat hann skal gera. Um vit víðari brúka somu mynd, eri eg rødd fyri, at um vit ikki tala at rættiliga skjótt, verða dyrnar latnar upp á víðan vegg - har eingin skal ella torir at siga nøkrum nakað.

**Mangla arbeiðssemi**
Um vit hyggja at potentialinum, sum liggur í føroyska fólkaskúlanum, eru heilt víst ótalligir møguleikar at gera hann til ein av heimsins bestu. Tó kemur einki av sær sjálvum – uttan líkasæla.

Eg veit, at tíð skal til at menna og broyta tað, sum nýliga er sett á skinnara. Tó haldi eg, at lærarar skulu aftur fáa sítt pláss sum undirvísarar og fáa amboð og greiðar reglar at loysa størstu gerandistrupulleikarnar, sum eru líkasæla og leti. Arbeiðssemi og dugnaskapur skulu aftur á dagsskránna. Málið er ikki at duga best, men at gera sítt besta.

# Politiskt atgerðarloysi - Fosturtøkulógin!

JACOB VESTERGAARD
løgtingsmaður



Stormarnir hava júst lagt seg eftir politiska ódnarveðrið, sum herjaði eftir at lógin um vinnuligan fiskiskap – fiskidagarnir v.m. – var samtykt í Løgtinginum.

Flokkur, sum ikki kann verða stjórnarberandi er tað allíkavæl. Floksformenn, landsstýrismenn og løgmaður siga eitt í dag, men í morgin gera teir júst tað mótsætta.

Tann eina dagin bar ikki til at hava eina minnilutasamgongu, tað máttu verða minst tríggir stórir flokkar í samgonguni, men dagin eftir gleddu allir seg til veruliga at koma í gongd og royna eina minnilutasamgongu.

Eina kann siga og gera tað ein vil, onki fær politiskar avleiðingar.

Tá teir sum eru settir til at verða formenn í flokkum, tingbólkum v.m., ikki megna at halda høvdið kalt, tá á stendur, verður skilið hareftir – politiskt atgerðarloysi.

Fleiri politisk lágtrýst eru á veg, sum eru væl egnað til at halda lív í tí áhaldandi klandrinum í samgonguni.

Eitt av hesum politisku lágtrýstum er átakið viðvíkjandi Fosturtøkulógini.

Lýsing frá útlendskari fyritøku, sum eggjar føroyskum kvinnum til at innflyta og nýta ólógligan heiluvág, hevur fingið onkran at ressast við.

Onki ilt orð um útlendsku fyritøkuna og tey sum bróta lógina, nei, vit skulu broyta fosturtøkulógina, tí hon er ov avmarkandi. Ólógliga átakið uttanífrá verður nýtt sum jarnbrot fyri at fáa kjakið um fría fosturtøku aftur á dagsskránna.

Fosturtøkulógin trongir møguliga til at endurskoðast, men treytirnar fyri at fremja fosturtøku mugu ikki linkast, heldur tvørturímóti. Fosturtøka má bert fremjast í heilt serligum førum, soleiðis sum ásett er í § 1, stk. 1 í verandi løggávu.

Í Føroyum hevur ongin fyri neyðini at fremja fosturtøku orsaka av sosialum orsøkum.

Ongin skal hava "loyvi" ella "rætt" til at tína mannalív.

Eg havi ongantíð skilt tann hugburðin, at tað skal verða í lagi at tína lívinum á tí ófødda barninum.

Eftir at barnið er gitið í móðurlívið, hevur tað eins góðan rætt til lívið, sum vit onnur. Tað má og skal verða okkara skylda at verja lívið hjá tí ófødda barninum.

Um nøkur fá vilja hava rættin til fría forsturtøku, og um onkur einstakur brýtur lógina, eiga vit at halda fast við, at fosturtøka bert má loyvast í heilt serligum førum.

Vit eru vælsignaði við sera høgum burðartíttleika, tí hægsta í norðurlondum. Vit mugu gera alt fyri at stimbra hesari jaligu gongdini, samstundis sum vit sláa fast, at vit í Føroyum ikki vilja hava løggávu, sum loyvir fríari fosturtøku.

# Ikki so firtin Sølvará

RICHARD DANIELSEN



Eg haldi ikki, at tað er heilt rætt, tá ið tú einar sjey ferðir í grein í Dimmalætting sigur fyri Føroya fólki, við mær í triðja persóni, at eg leggi eftir tær persónliga. Tað, sum eg gjørdi í míni grein, var at eg citeraði skriftstøð úr 1. Jóhannesar brævi. At hetta so hevur rakt teg so meint, er nakað sum eg, sum so, ikki kann ger nakað við. Skriftin er livandi og sum eitt tvíeggja svørð, tað sigur hon sjálv.

Tað, at eg haldi meg vera syndaleysan kanska. - Hatta verður av og á sagt um trúgvandi. Hatta er milt sagt eitt stórt misforstáilsi. Tey, sum játta trúgv á Jesus, eru tey, sum júst hava ásannað, at tey eru sek - syndarar. Tað er ikki meiningin hjá mær, at standa uppi á einum palli við steini í hondini at kasta á Hans A. Sølvará ella nakran annan. Tað havi eg onga grund til. Eg eri ikki betri enn tú ella nakar annar. Eg havi verið raktur av orðinum sjálvur, men eg fekk náði til at venda mær til Hansara, sum slerdi meg, og hjá honum havi eg fingið ein so undurfullan frið í hjartað, og tí vil eg arbeiða ímóti teimum, sum sáa iva um orð Guds. Eg geri hetta ikki fyri at verja mína trúgv, tað er ikki neyðugt, heldur ikki fyri at verja orð Guds, tað er enn minni neyðugt, skriftin verjir seg sjálv, Gud hevur ikki fyri neyðini, at nakar skal hjálpa honum. Eg geri tað fyri at verja míni samsystkin í Harranum, serliga tey ungu. Sinnið er ógvuliga viðkvæmt, serliga í teimum árunum, tá ið tey fara frá barnaárunum til vaksnamanna lív. Tí treingja tey til, og tað treingja vit øll, at verða styrkt í trúnni, eisini við at tað verður talað at, tá ið bíblian, tær heilagu skriftirnar, verða álopnar.

DEKKMASTER.FO
www.dekkmaster.fo
info@dekkmaster.fo
telefon 227 000

...tá ið prísurin eisini er avgerandi!



18" BMW New 3
Við 225/40-18 dekkum
Original-look felgur til BMW 3-røðina. Verða latnar við boltum og BMW-búmerkjum.
Eru á goymslu.
Fyri settið
9.990,-



18" RS4
Við 225/40-18 dekkum
Original-look felgur til VW/Audi. Felgurnar verða latnar við VW/Audi-búmerkjum.
Eru á goymslu.
Fyri settið
9.990,-

Góð og bílig dekk

Prísdømi

| | |
|---|---|
| 175/65-14 | úr **620,-** |
| 195/55-15 | úr **775,-** |
| 195/65-15 | úr **795,-** |
| 205/55-16 | úr **890,-** |
| 205/40-17 | úr **965,-** |
| 225/45-17 | úr **995,-** |
| 225/40-18 | úr **1.290,-** |
| 235/35-19 | úr **1.710,-** |



Nógvar aðrar flottar felgur